NEVNDARFRÁSØGN

2020

# REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP



# INNIHALDSYVIRLIT


Um felagið ........ 2

Í nevndini í RFH sita: ........ 2

Felagið í tølum ........ 3

SHIPPINGVINNAN Í FØROYUM ........ 4

Sáttmálasamráðingar ........ 5

Korona ávirkað 2020 ........ 5

Sjóvinnuforum 2020 ........ 6

Tvískattaavtalur ........ 7

Hagtøl ........ 7

Nýggj krøv til vinnuna ........ 8

IHM krøv: ........ 8

RFH serligan heiður frá Visit Faroe Islands ........ 9

Lógarbroytingar síðan seinast ........ 10

Tonsaskattaskipanin: ........ 10

Kunngerð um óljóð: ........ 10

Skipsdagbøkur: ........ 10

Broyting í lógini um ALS: ........ 11

SAMANUMTIKIÐ ........ 12

## Yvirlit yvir limirnar:

Bakkafrost Farming

Bal-Bulk P/F

Faroe Ship P/F

Mariner Sp/f

Navigare Shipping

Nolsøe Shipping Sp/f og Furesea Sp/f

Samskip P/F

Sandgrevstur P/F

Silver Liner Faroe Islands Sp/f

Skansi Offshore

Skipafelagið Norlines Sp/f

Smyril Line P/F

SVITZER Faroe Islands P/F

Thor P/F

Thun Sp/F

# Um felagið

Reiðarafelagið fyri Handilsskip (RFH) er felag fyri reiðarar av føroyskum handilsskipum.

Endamál felagsins er at savna allar reiðarar fyri føroysk handilsskip til at útinna felags áhugamál, m.a. at gera sáttmálar við feløgini fyri manningarnar á føroyskum handilsskipum, eins og á øðrum økjum at verja felags áhugamál limanna. RFH er limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og umsiting felagsins er í Vinnuhúsinum.

Hesi seinnu árini er felagið og virksemi í felagnum munandi vaksið og telur í dag 15 limir umboðandi 73 skip.



## Í nevndini í RFH sita:

Jens Meinhard Rasmussen, formaður

Hentzar Steingrímsson, næstformaður

Gunnbjørn Joensen

Rúni V. Poulsen

Jónas Sigmarsson

Sjúrður Johansen

Bogi P. Nielsen

## Felagið í tølum

Í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip (RFH) eru nú 15 limir, sum umboða 73 skip. Í 2021 varð samlaða tonnagan uml. 311.000 BT í mun til 321.000 BT og 320.000 BT í ávikavist 2020 og 2019. Limirnir eru virknir innan m.a. siðbundnan farmaflutning, ferðafólkaskip og tænastuskip innan alivinnu og oljuvinnu. Afturat hesum fevnir shipping eisini um atknýtt virksemi á landi.

Tey flestu skipini í RFH eru skrásett í FAS. Talið av skrásetingum í FAS er vorðið meira støðugt seinastu árini, og hetta ger seg eisini galdandi fyri limatalið í RFH.

Nevndin fegnast um, at ein stórur partur av reiðaríunum, sum hava skip í Føroysku Altjóða Skipaskránni, eru limir í RFH. Tað hevur stóran týdning, at vinnan stendur saman um at bera vinnugreinina fram á leið, soleiðis at hon alsamt gerst ein størri og týdningarmiklari partur av føroyska vinnulandslagnum.



# SHIPPINGVINNAN Í FØROYUM

Shipping sum vinnugrein styrkir tann føroyska búskapin - bæði við at økja um útflutningsvirðið og við at skapa ein meira fjølbroyttan arbeiðsmarknað í Føroyum. Harafturat er shipping ikki einans tengd at samfelagsgongdini í Føroyum, men í størri mun at gongdini í heimsbúskapinum. Hetta merkir, at stóru konjunktursveiggini, sum javnan merkja føroyska búskapin, kunnu javnast við eini slíkari vinnugrein.

Júst tí er týdningarmikið, at dentur verður lagdur á at stimbra shipping sum vinnugrein í Føroyum.

Sum stabbamyndin niðanfyri vísir, skapar henda vinnugreinin nógv arbeiðspláss. Samanlagt eru upp móti 1.200 sjófólk umborð á skipum undir RFH, og starvsfólkatalið á landi nærkast teimum 300 í januar 2021.

Tølini vísa, at handilsflotin eisini er merktur av COVID-19 farsóttini, tí reiðarí hava verið noydd at tillaga sítt virksemi nakað. Harumframt hava nøkur skip flaggað um til annað flagg og hava tí ikki sítt virksemi í Føroyum longur.

Lutfallið millum talið av føroyingum, norðurlendingum og øðrum útlendingum er hampuliga støðugt. Tó er talið av útlendingum vaksið seinasta árið, ímeðan talið av føroyskum sjófólki er lækkað nakað. Lækkingin kemst av, at føroyingar vóru umborð á skipunum, sum fóru úr føroyska flotanum í 2020.

Ein stór avbjóðing er framvegis at fáa fulltiknar føroyskar dekkarar til skipini. Henda arbeiðsmegi er nærum ikki tøk í Føroyum. Trupult er at fáa næmingar gjøgnum skipanina, tí teir støðast ikki nóg leingi á útbúgvingini á Vinnuháskúlanum. Tí er neyðugt, at útbúgvingin fyri fulltiknar dekkarar verður eftirmett og tillagað. Talan er um ein vaksandi tørv á útlendskari arbeiðsmegi, og hesin tørvur verður væntandi størri framyvir. Greitt er, at um Føroyar skulu vaksa sum shippingland, er framvegis neyðugt at hava útlendsk sjófólk umborð. Hetta er galdandi fyri Føroyar, eins og tað er galdandi í londunum kring okkum.



Føroyska flaggið hevur eina góða meting á góðskulista yvir skipaskrásetingar. Kappingarføri hjá reiðaríum í føroysku altjóða skipaskránni, FAS, er knýtt at metingini av flagginum. Um flaggið ikki verður mett sum góðskuflagg, kann hetta ávirka virksemið og raksturin hjá reiðaríum, eitt nú við øktum eftirlitsvitjanum og fleiri krøvum til avtalur.

Tí hevur RFH roynt at gjørt sítt til, at FAS varðveitir sína høgu meting á Flag State Performance listanum hjá ICS. RFH hevur í hesum sambandi heitt á øll reiðarí um at taka eftirlitsvitjanir í størsta álvara, og gott er at síggja at Føroyar framvegis eru grønar á talvuni.

## Sáttmálasamráðingar

Sáttmálarnir millum RFH og tey trý manningarfeløgini, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið og Føroya Fiskimannafelag, ganga út 1. mars 2021.

RFH hevur tilsamans níggju sáttmálar við tey trý manningarfeløgini. Við hvørt felag er ein høvuðssáttmáli og tveir sersáttmálar fyri ávikavist størri og smærri skip í frálandavinnu.

RFH og manningarfeløgini hava handað hvørjum øðrum krøv, og samráðingarnar halda fram í seinnu helvt av februar.

Vónandi eydnast at koma á mál við samráðingunum, áðrenn sáttmálarnir ganga út.

## Korona ávirkað 2020




Korona farsóttin hevur merkt 2020 fyri flestallar vinnur, og shippingvinnan er onki undantak.

Bæði inn- og útflutningur minkaði nakað, tá COVID-19 rakti Føroyar og londini kring okkum. Uttanlands er flutningur vorðin dýrari undir COVID-19, men prísurin í Føroyum er óbroyttur. Støðan fyri flutningsfeløgini hevur tó samanumtikið víst seg at verið toluliga støðug hetta tíðarskeiðið.

Alt virksemi, sum er tengt at ferðafólkaflutningi og ferðamannaskipum, er nærum steðgað upp. Enn er ikki gongd komin á aftur innan hesa vinnugrein.

Olju- og offshore vinnan er ávirkað av niðurgongd í sambandi við COVID-19, og verkætlanir eru avlýstar í hópatali, og nýggjar verkætlanir eru útsettar ella avlýstar. Hetta hevur eisini ávirkað føroysk feløg innan offshore, summi harðari enn onnur.

Afturlatin landamørk hava elvt til avbjóðingar, men samanumtikið eru manningarskifti í norðanlondum farin fram rímiliga ótarnað. Tó hava avbjóðingar verið um tvungið sóttarhald o.l. Fleiri føroysk reiðarí hava fingið skip til Føroyar til manningarskifti í mars og apríl, tá truplast var at ferðast millum lond.

Føroya landsstýrið hevur gjørt eina koppsetingarætlan, nú farið er undir at koppseta móti COVID-19.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip hevur umvegis Vinnuhúsið víst landsstýrinum á, at sjófólk eiga at verða millum teirra, sum verða raðfest í hesi ætlan, tí sjófólk eru serliga útsett í hesum tíðum og eiga at fáa koppseting skjótast gjørligt. Landsstýrið hevur áður boðað frá, at ætlanin er at koppseta tey við samfelagskritiskum størvum í apríl, og RFH vil framhaldandi streingja á, at sjófólk eru við í tí koppsetingarumfarinum.

Vinnan hevur heitt á myndugleikarnar um at finna ein greiðan leist, soleiðis at sjófólk kunnu skjalprógva sína COVID-19 koppseting skjótt og lætt.

Arbeitt verður bæði við einum altjóða koppsetingarkorti eins og stjórnin í Danmark saman við vinnuni hevur kunngjørt ætlanir um eitt koppsetingarpass.

Myndugleikanir í Føroyum hava tó ikki meldað út enn, hvør leisturin verður í Føroyum, men vinnan vónar at hetta verður greitt skjótt.



## Sjóvinnuforum 2020

Tann 26. november í fjør varð skipað fyri Sjóvinnuforum, sum snúði seg um shipping og vakstrarmøguleikar. Á skránni vóru fleiri áhugaverdar framløgur, og tiltakið lýsti týdningin av shipping sum útflutningsvinnu fyri føroyska búskapin. Endamálið við Sjóvinnuforum er at savna fólk úr vinnuni og tey, ið hava tilknýti til vinnuna.

Sjóvinnustýrið skipar fyri Sjóvinnuforum saman við Reiðarafelagnum fyri Handilsskip og manningarfeløgunum, og tiltakið varð fyriskipað eftir almennu tilmælunum.

Jens Meinhard Rasmussen, formaður í RFH, greiddi m.a. frá, at shipping er ein avgerandi tænastuveitari til flutning av vørum kring heimin, og ein vælvirkandi shipping vinna er tí ein týðandi fortreyt fyri framhaldandi búskaparligari menning í heiminum. Shipping er somuleiðis tann mest burðardygga loysnin at flyta vørur millum lond.

Heimsbúskapurin hevur staðið í vøkstri seinastu mongu árini. Fólkatalið í heiminum veksur eisini støðugt, og av tí sama fer shipping væntandi at vaksa nógv í framtíðini. Shipping er ein altjóða vinna, og tí kann hon eisini vera við til at javna sveiggj í føroyska búskapinum. Hetta eru m.a. orsøkir til, at Føroyar og føroysk reiðarí mugu verða kappingarfør fyri at standa seg í altjóða kappingini.

## Tvískattaavtalur

RFH hevur støðugt víst á, at okkum tørvar fleiri tvískattaavtalur við lond. Tvískattaavtalur eru neyðugar fyri at føroysk reiðarí kunnu vera kappingarfør og kunnu bjóða seg fram kring allan heimin.

Føroyar hava í dag fáar tvískattaavtalur við onnur lond, og okkum hevur ikki eydnast at økt um talið av tvískattaavtalum seinastu mongu árini.

Á sjóvinnuforum 2020 vísti Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, á, at antin má farast undir samráðingar við lond hvør sær um tvískattaavtalur, ella kunnu Føroyar verða knýttar at donskum skipanum innan hetta økið.

Í heyst 2020 heitti RFH á løgmann, landsstýrismannin í fíggjarmálum og landsstýrismannin í vinnumálum um at møta felagnum á fundi at umrøða tvískattaavtalur. Fundurin varð hildin í november. RFH sendi eftir fundin ein raðfestingarlista av londum, sum Fíggjarmálaráðið skuldi hyggja nærri at.

## Hagtøl

Í Føroyum er tørvur á betri hagtølum av útflutningsvirðinum fyri føroyska handilsflotan.

Tað er trupult at staðfesta, hvussu nógv verður útflutt av shipping tænastum, partvís tí almennu hagtølini eru ikki dagførd síðani 2017, og harnæst eru tølini fyri shipping deild yvir fleiri bólkar, so ikki ber til at fáa eitt samlað yvirlit.

Tøl hjá RFH frá 2015 vísa, at umsetningurin hjá limum felagsins var millum 1,5 og 2 mia. kr. árliga. Ein varlig meting er, at umleið helmingurin av hesum er frá útflutningi.

Á Sjóvinnuforum 2020 gjørdi Hans Ellefsen, búskaparfrøðingur, eina varliga meting, har hann sambært tølum frá Hagstovuni metti samlaða útflutningsvirðið hjá shipping at vera umleið 1,1 mia. kr. í 2017.

Handilsskipaflotin stendur soleiðis fyri størsta føroyska útflutningsvirðinum eftir fiskavørur, og er tí ein týdningarmikil partur av føroyska búskapinum.

RFH hevur verið á fundi við Hagstovuna fyri at umrøða verandi hagtøl, dagføringar av hagtølunum og eisini nýggjar hættir at savna inn nágreinilig hagtøl fyri handilsflotan. Felagið er nú í holt við at fáa hesi tøl til vega.

# Nýggj krøv til vinnuna

## IHM krøv:

1. januar 2021 komu nýggj IHM krøv í gildi fyri skip við ES/EEA flaggi og skip, sum sigla til havnir í ES/EEA økinum. IHM (Inventory of Hazardous Materials) er ein listi, sum veitir nágreiniligar upplýsingar um skip viðvíkjandi vandamiklum evnum, sum eru umborð, teirra staðseting og nøgdir.

Evstamark fyri ES SSR er framvegis tann 31. desember 2020 fyri skip við ES/EEA flaggi, og fyri skip við øðrum flaggi kemur hetta í gildi fyrstu ferð skipið vitjar eina ES/EEA havn. ES kunngerð (2020/C349/01) greiðir nærri frá eini møguligari útseting av gildiskomu ísv. at gera eina kanning orsakað av Covid-19 farsóttini, tó er hon avmarkað til fýra mánaðir ella til 30. juni 2021, alt eftir hvat kemur síðst.



## RFH serligan heiður frá Visit Faroe Islands



27. februar skipaði Visit Faroe Islands fyri hátíðarhaldi, har Ársins Ambassadørur 2020 og Ársins Ambassadørátak 2020 vórðu kosin. Eisini lat dómsnevndin ein serligan heiður til Reiðarafelagið fyri Handilsskip.

Serligi heiðurin varð latin til RFH, tí felagið í juni 2019 var vertur fyri aðalfundinum hjá International Chamber of Shipping (ICS) og sostatt skipaði fyri at fáa altjóða fundarvirksemi til Føroya. ICS er fremsta altjóða vinnugreinafelagið fyri handilsskipareiðarar og umboðar yvir 80% av altjóða handilsflotanum. Skipað varð fyri trimum døgum við m.a. fundarvirksemi og útferðum kring landið.

Visit Faroe Islands grundgav soleiðis fyri heiðrinum:

Føroyar bjóðaðu stórum ráðstevnubýum sum Hong Kong og Istanbul av, tá Reiðarafelagið fyri Handilsskip bjóðaði altjóða reiðarafelagnum International Chamber of Shipping til Føroya at halda teirra árliga fund. Felagsskapurin, sum vanliga heldur teirra fundir á fimm-stjørnaðum hotellum, hildu hesaferð fundin í fimm-stjørnaðari náttúru, fimm-stjørnaðari frískari luft og við fimm-stjørnaðum føroyskum laksi. Eftirmetingarnar vísa, at hetta eydnaðist framúr væl, og at luttakararnir vóru betri nøgdir enn nakrantíð.






# Lógarbroytingar síðan seinast

Eitt aðalmál hjá RFH er, at Føroyar fylgja altjóða sáttmálum innan handilsflotan. Tí verður eisini tikið undir við lógarbroytingum, sum eru ein avleiðing av føroyskari luttøku í altjóða samstarvi. Flestu lógir og kunngerðir, sum verða sendar til hoyringar, eru avleiðing av okkara altjóða skyldum, og tá hevur RFH sjáldan viðmerkingar til uppskotini.

Øll hoyringssvarini eru annars at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum á www.industry.fo.

## Tonsaskattaskipanin:

Eftir áheitan frá RFH vóru broytingar gjørdar í tonsaskattalógini í juni 2020. Broytingar í lógini vóru neyðugar, fyri at skipanin kann dagførast og vera kappingarfør í mun til slíkar skipanir í øðrum londum.

RFH gjørdi í hoyringssvarinum m.a. vart við týdningin av, at tonsaskattalógin eigur at fevna um alt virksemið, sum er knýtt at flutningsveitaranum. Samtykta lógarbroytingin var tó ikki eins víðfevnd og RFH skeyt upp. Men broytingarnar merkja, at tonsaskattaskipanin aftur kann samanberast við slíkar skipanir í londunum kring okkum.

## Kunngerð um óljóð:

Í desember 2020 var kunngerð um óljóð frá skipum við bryggju send til hoyringar. Kunngerðin setti nøkur markvirði fyri lágfrekventa óljóðið frá skipum við bryggju, mátað innandura í bústaðarbygningum, bústovnum og sjúkrahúsum. RFH gjørdi vart við, at tað er av alstórum týdningi, at verandi virksemi ikki verður tarnað ella avmarkað av nýggju kunngerðini.

Vinnan hevur hvørki møguleika at fyrihalda seg til ella at fyrireika seg uppá nýggju reglurnar, tí ongin kennir ljóðstøðið í dag. Markvirðini verða mátað á landi og ikki umborð ella við at seta krøv til motor og útgerð. Hetta ger, at reiðarí ongan møguleika hava at kanna teirra støðu í mun til hetta uppskotið. Av somu orsøk er eisini ómøguligt at fyrireika seg til nýggju reglurnar.

RFH mælti til, at myndugleikarnir fara undir arbeiðið at seta upp skipanir til landstreym. Við landstreymi kunnu skip kobla til og liggja við bryggju við sløktum motori, hóast arbeiðið heldur fram. Tá fer málið í minni mun at snúgva seg um áseting av markvirði, hvussu máting verður framd, hvussu reiðarí kunnu tryggja síni skip og hvussu virksemi skal leggjast til rættis við bryggju. Landstreymur er eisini betri fyri umhvørvið og minkar samstundis um larm í nærumhvørvinum.

## Skipsdagbøkur:

Í februar 2020 kom nýggj kunngerð um skipsdagbøkur í gildi. RFH tók undir við kunngerðini.

## Broyting í lógini um ALS:

ALS-skipanin varð broytt í desember 2020 fyri at tryggja, at heimild er í ALS-lógini at taka ímóti gjaldi frá teimum, sum eru fevnd av norðurlendska sáttmálanum um almannatrygd, og sum sambært ásetingunum í sáttmálanum hava skyldu at vera arbeiðsloysistryggjað í Føroyum.

Ein persónur, sum er fevndur av norðurlendska sáttmálanum, kann einans vera fevndur av sosialu lóggávuni í einum Norðurlandi, og hetta er vanliga í arbeiðslandinum.

Løntakarin, sum er undir FAS og hevur fastan bústað í Føroyum ella einum av hinum Norðurlondunum, fær við hesi broyting gjaldsskyldu til føroysku Arbeiðsloysisskipanina.

Afturat hesum vinnugreinaserligu hoyringssvarum er RFH partur av teimum yvirskipaðu hoyringssvarum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag gevur á vinnu- og arbeiðsmarknaðarpolitiska økinum.



# SAMANUMTIKIÐ

Shipping er við til at fjøltátta tann føroyska búskapin, og harvið styrkja og breiðka inntøkugrundarlagið hjá Føroyum. Eisini er shipping við til at styrkja føroyska arbeiðsmarknaðin við at skapa nýggj størv. Tøl frá RFH í januar 2021 vísa, at fleiri enn 1.400 starvsfólk eru knýtt at vinnugreinini, bæði á sjógvi og landið. Hetta er nakað lægri enn undanfarin ár, og hetta er fyrst og fremt orsakað av COVID-19 farsóttini, og at onkur skip eru flaggað út úr Føroyum.

2020 hevur í stóran mun verið merkt av COVID-19, bæði við minkandi virksemi og við avbjóðingum við manningarskiftum. Farið er undir eina koppsetingarætlan, og næsta stig er at finna hóskandi skjalprógv fyri koppseting, soleiðis at manningar kunnu ferðast ótarnaðar um landamørk. RFH vónar, at hetta kann setast í verk skjótast gjørligt.

Avgerandi fyri framtíðar menning av shipping vinnuni í Føroyum er, at vit framhaldandi eru kappingarfør á fleiri økjum. Ein liður í hesum er, at ferð átti at verið sett á arbeiði at gera fleiri tvískattaavtalur millum Føroyar og onnur lond. Eisini er týðandi, at Føroyar hava dagførd og eftirfarandi hagtøl fyri útflutning av tænastum. Væntandi verða tey fyrstu hagtølini fyri útflutning av shippingtænastum tøk tíðliga í vár.

**12. februar 2021**

**Nevndin í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip**

**Jens Meinhard Rasmussen, formaður**

**REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP**

Adressa
Óðinshædd 7
PO BOX 1038

Telefonnummar
00298 309900

Teldupostur
jorun@industry.fo

Fartelefon
00298 739913

Heimasíða
www.industry.fo

